# Tekniskt brek seinkaði fráferðini hjá Norrønu

**- Norrøna verður aftur í Føroyum til tíðina mánamorgunin klokkan 05, sigur Jógvan í Dávastovu, tekniskur leiðari hjá Smyril Line**




*Hóast fráferðin hjá Norrønu var seinkað tríggjar tímar hóskvøldið, verður skipið aftur á Havnini sambært ferðaætlanini mánamorgunin*

TEKNISKT BREK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ferðafólk, sum fóru úr Føroyum við Norrønu hóskvøldið, noyddust at bíða í tríggjar tímar, áðrenn skipið loysti. Sambært ferðaætlanini er fráferðin hjá Norrønu klokkan 21, men leyst var ikki í Havn fyrr enn um midnáttarleitið - ella tríggjar tímar seinni enn ætlað.

Ferðafólk, sum vóru við hendan túrin, siga, at tey vistu einki um, hví skipið ikki loysti til tíðina, og tey fingu einki at vita av brúnni um, hví fráferðin var seinkað.

- Vit kundu í minsta lagi fingið okkurt at vita, halda tey.

### Tekniskt brek

Tekniski leiðari hjá Smyril Line, Jógvan í Dávastovu, sigur, at orsøkin til seinkanina, var eitt lítið tekniskt brek umborð á skipinum.

Hann heldur tó ikki, at neyðugt er at fara út í detaljur um, hvat brekið snúði seg um.

- Men hetta hevði ikki nógv upp á seg og varð umvælt, áðrenn skipið loysti.

Jógvan sigur, at Norrøna var í Lerwick um 12.30-tíðina í gjár og fer síðan víðari til Hanstholm.

- Skipið verður aftur í Havn sambært ferðaætlanini klokkan 05 mánamorgunin.

### Eg veit ikki…

Spurdur, um ferðafólk ikki fingu at vita, hví Norrøna var seinkað, sigur hann, at tað er nakað, sum manningin umborð á skipinum eigur at taka sær av.

- Eg veit ikki, hvat ferðafólk fingu at vita og ikki, men tað er ikki óhugsandi, at tey, sum hava gjørt vart við seg, kanska ikki hava hoyrt (møguligu) boðini um seinkanina, sigur Jógvan í Dávastovu.

# Vegirnir í Kalsoynni eru ein skomm

**- Er trygdin í tunlunum í Kalsoynni ikki er líka so týðandi, sum trygdin í hinum tunlunum í landinum? spyr lesari, sum hevur vent sær til Sosialin**

KALSOYGGIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg havi ferðast nógv á Kalsoynni, og tað hevur verið mær ein stór gleði at komið hagar. Tað, sum gleðir meg mest, er, at oyggin við nýggjari ferjulegu á Syðradali nú fær eitt gott samband við meginøkið. Men eg havi eitt hjartasuff, sum pínir meg nógv. Tað er, at vegurin úr Syðradali og norður til Mikladals er í so vánaligum standi.

Soleiðis sigur ein lesari, sum hevur vent sær til Sosialin.

- Eg hugsi serliga um teir tríggjar tunlarnar millum Hattardal og Mikladal, harav tunnilin til Trøllanesar er heldur frægari enn hinir báðir.

Lesarin sigur, at tað var ein stór frøði, tá ið hesir tunlar komu.

Hann finst serliga at koyribreytunum í tunlunum, sum lagaligt sagt eru í alt ov vánaligum standi.

- Tá ið koyrt verður av Húsum og norður til Mikladals í bussi, situr tú meginpartin av túrinum í leysari luft.

Lesarin heldur, at um ein slík vegabreyt, sum tann í tunlunum, lá rundan um húsini hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, hevði pípan havt eitt annað ljóð, sum hann tekur til.

- Eg haldi ikki, at tunlarnir eru tryggir at koyra ígjøgnum. Dettur grót niður á bilin, kann tað sjálvandi elva til stóran skaða.

Lesarin, sum er rættiliga væl kendur við umstøðurnar í Kalsoynni, sigur, at Landsverk hevur ikki tikið leyst grót undan loftinum í tunlunum í oynni tað, sum hann kann minnast.

- Tí vil eg spyrja, um trygdin í tunlunum í Kalsoynni ikki er líka týðandi, sum trygdin í hinum tunlunum í landinum?

- Hvat við trygdini, um eldur skuldi komið í bussin inni í tunlinum, og hvat sigur Brunaumsjónin til viðurskiftini?

Lesarin vísir á, at eingin bilur kann halda til vegirnar í Kalsoynni, soleiðis sum teir eru í dag.

- Hetta er stór skomm, heldur hann.

Lesarin vil fegin hava at vita frá landsstýrismanninum, Bjarna Djurholm, nær farið verður undir at bøta um vegirnar í Kalsoynni og trygdina í tunlunum.

- Er peningur settur av á fíggjarlógini til hesi arbeiði - ella skulu kalsoyingar og onnur, sum ferðast út í oynna, bíða í 10 ella 20 ár, áðrenn nakað verður gjørt? spyr lesarin at enda.

Fiskivinnuskúlin:

# Áhugaverd skeið fyri matvøruframleiðarar

**Tíðin krevur, at tú dagførir tína vitan, og hetta er ikki minst galdandi fyri matvøruframleiðandi virkir, sum virka vørur til útflutnings ella til heimamarknaðin**

SKEIÐVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tíðin stendur ikki í stað - og tíðin krevur nógv. Arbeiðir tú við matvøruframleiðslu, er neyðugt at dagføra tína vitan*

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur nú tikið stig til at skipað fyri skeiði í innaneftirliti og matvørutrygd, og 14 fólk úr ymiskum fyritøkum, sum framleiða matvørur til útflutnings og heimamarknaðin, hava luttikið. Hesi starvast hjá Faroe Marine Products, Fiskavirkinum í Gøtu, Viking Seafood, P/F Poul Hansen, Kaldbak Seafood, Fóm Ísur, Pure Water, Kósin Seafood, Vaðhorn Seafood og hjá Faroe Marine Biotech.

Skeiðið verður hildið á Hotel Føroyum í trimum eindum, og seinasti skeiðsdagurin á hesum sinni er 12. apríl, tá ið luttakararnir fáa handað skeiðsprógv.

Í sambandi við handanina, sum verður klokkan 16 hendan dagin, fer stjórin á Fiskivinnuskúlanum, Jákup Andreasen, at siga nøkur orð um tiltakið.

- Fjølmiðlarnir eru bodnir at verða við, tá ið prógvini verða handað, og tí er væntandi, at meira verður at frætta um skeiðstiltakið hjá Fiskivinnuskúlanum í komandi viku, sigur Drós í Ólavstovu, ið er ein teirra, sum hevur verið við til at fyrireikað skeiðið í innaneftirliti og matvørutrygd.

### At flyta hugburðin

Tíðin krevur, at tú dagførir tína vitan, og hetta er ikki minst galdandi fyri matvøruframleiðandi virkir, sum virka vørur til útflutnings ella til heimamarknaðin.

Sum skilst, hevur skeiðið hjá Fiskivinnuskúlanum verið bæði áhugavert og spennandi, og frálæruháttur urin hevur verið dynamiskur og aktiverandi - og evnini hava verið viðkomandi.

- Undirvísingin hevur verið á einum støði, har øll kunnu luttaka, sigur Fiskivinnuskúlin.

Skeiðið er skipað við fyrilestrum, sum fólk frá vinnuni og tí almenna halda - og við kjaki og bólkaarbeiði.

- Luttakararnir fáa ikki nógv tilfar at lesa, men fáa avrit av framløgum og læra eisini, hvussu tey kunnu halda sína vitan viðlíka, sigur Fiskivinnuskúlin.

# Fokus á upphavsrætt

**Hvat er upphavsrætturin, og hvussu kann upphavsrættur skipast?**

UPPHAVSRÆTTUR
*Tíðindaskriv*

Hetta og mangt annað um upphavsrætt verður á skránni, tá ið Mentamálaráðið skipar fyri kunnandi fundi á Hotel Føroyum fríggjadagin 15. apríl 2005 kl. 9.30-12.00.

Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at fáa upphavsrættin hjá listafólkum í rættlag. Mentamálaráðið arbeiðir samsvarandi hesum við føroyskari upphavsrættarlóggávu. Á fundinum fer Mentamálaráðið at kunna um hetta arbeiðið.

Tað er danska Mentamálaráðið, sum í dag fyrisitir lóggávuna um upphavsrætt í Føroyum. Mentamálaráðið hevur tí boðið Peter Schønning, stjóra á Upphavsrættarskrivstovuni í danska Mentamálaráðnum, at vera við á fundinum fyri at greiða frá upphavsrætti sum heild, s.s. lóggávu v.m. Peter Schønning er viðurkendur serfrøðingur í upphavsrætti.

Høvið verður at seta spurningar og annars geva viðmerkingar til hvussu føroyska upphavsrættarøkið kann verða skipað á skilabesta hátt í framtíðini.

Fundurin er fyrst og fremst ætlaður einstaklingum, stovnum, fyritøkum og felagsskapum, ið hava serstakan áhuga í upphavsrætti og upphavsrættarlóggávuni.